


**Nr. 5** *27. februar 2022* **82. árg.**

# Og eigur tú eitt vinaorð, so sig tað nú

Eitt mánakvøld í desember mánaði var Njál Djurhuus niðri á Blákrosskaféini. Hann segði frá ymiskum, millum annað frá hesi hending:

Ein fríggjadag sat ein misnýtari niðri í túninum framman fyri Stórtinginum í Oslo. Hann biddaði pengar. Ein kona kom framvið. Hann bað eisini hana geva sær eitt oyra.

„Nei, nei, nei!“ rópti hon óð, beint inn í andlitið á honum. So fór hon so nakkafatt víðari. Men tá ið hon hevði gingið nøkur fá fet, fekk hon ræðuligt samvitskubit.

„Hví skal eg partú standa sum ein annar óður leinkjuhundur og goyggja niður í andlitið á honum? Hví kann eg ikki tosa hampiliga við hann?“

Hon vendi við aftur og fór at práta við hann. Tey tosaðu saman eina góða løtu. So sigur hon: „Eg gevi tær ongar pengar, tí eg veit, at teir fara til rúsevni. Men eg ynski tær av mínum innasta hjarta eitt gott vikuskifti.“

Tá sigur hann: „Takk fyri, at tú tosaði við meg. Í seks vikur hevur eingin tosað við meg. Tú ert hin fyrsta, sum í seks vikur ert steðgað á og hevur givið tær stundir at práta við meg.“

Henda konan hevði so ringa samvitsku um gerð sína, at hon fór beint inn í hølið hjá frelsunarherinum og segði frá hesi hending.

Men hvat eru vit fyri menniskju? Vit megna at koma upp á mánan, og vit megna at koma niður aftur; men vit duga ikki at tosa við hann ella hana, sum liggur niðri í veitini fram við lívsins landavegi.

*Effie Campbell.*

# Vælsignaður

Tá ið eg var barn, plagdu vit at biðja hesa køldbønina, sum danski sjónleikarin Peter Thun Foersom skrivaði í 1813:

*Nu lukker sig mit øje,*
*Gud Fader i det høje*
*i varetægt meg tag.*
*Fra synd, fra sorg, fra fare*
*din engel mig bevare,*
*som ledet har min fod i dag.*

Foreldrini sótu á songarstokkinum og bóðu saman við mær. Undan hesi bønini høvdu tey lisið eina søgu fyri mær.

At enda, áðrenn vit sovnaðu, lýstu mamma og pápi eina signing yvir okkum, sum var nógv túsund ára gomul. Eg skilti, at tað var nakað heilt annað at lýsa enn at lesa; men hvat ið tað av sonnum merkti, dugi eg ikki enn heilt at greiða frá.

Eg hugsaði mær, at tað var sum at stíga inn í eina sólarrípu á gólvinum og standa har og blíva gull-littur, allur sum eg var. Og av tí at signingin er so ómetaliga gomul, dámdi mær at hugsa, at bæði langabbi og oldurabbi og eisini Jesus høvdu staðið í tí ljósinum, tá ið teir vóru lítlir, einaferð langt, langt síðani.

*Harrin vælsigni teg og varðveiti teg!*
*Harrin lati andlit sítt lýsa yvir teg og veri tær náðigur!*
*Harrin lyfti upp ásjón sína yvir teg og gevi tær frið!*
*(4. Mós. 6,24–26).*

*„Krigsropet“ – Effie Campbell* umsetti.

# At venja seg til okkurt

Eg vil venja meg við eitt, sum er so frígerandi – og tað er eitt dagligt lív saman við mínum himmalska Faðir. Tað er tað besta, vit kunnu gerast bundin av. Tað er ikki ein religión, men ein persónur, sum tú dagliga hevur samband við.

Um Jesus stendur í Luk. 4,16: „Og hann kom til Nasaret, har sum hann var vaksin upp, og hann fór, sum siður hansara var (sum hann **plagdi**), hvíludagin inn í samkomuhúsið“.

Í Markusi 1,35 stendur: „Árla á morgni, áðrenn tað var fullljóst, fór hann upp og gekk út, og hann fór burtur á ein oyðistað og helt bøn har.“

Jesus hevði vant seg við at ganga saman við Faðir sínum – í gudstænastuni og andlit til andlits.

Sálmur 88,14: „Men eg, Harri, rópi á teg, á morgni nærkar mín bøn sær til tín!“ Sálmaskaldið hevur vant seg til hvønn morgun at hava felagsskap við Gud.

Dárius kongur í Bábel kunngjørdi eina lóg, har skrivað stóð, at øll skuldu tilbiðja hann í 30 dagar. Tú vart dømdur til deyða, um tú ikki gjørdi tað. Men líka legði Dánjal í hesa lóg, tí hann hevði vant seg við, at tað var Ísraels Gud, sum var hin sanni Gud. Skrivað stendur, at „hann helt á at biðja og takka Gudi tríggjar ferðir um dagin, sum hann hevði verið vanur at gera!“ (Dán. kap. 6).

Dánjal læt seg ikki hótta at biðja til ein avgud. Hann var so vanur við eitt lív saman við Ísraels Gudi, at sjálvt ikki hóttanin at verða blakaður fyri leyvurnar broytti nakað, tí hann var vanur at biðja og takka Gudi tríggjar ferðir um dagin, sum hann altíð hevði gjørt.

Hvørjar vanar hava tú og eg?

*Effie Campbell* umsetti.

# Vón fyri heimin

*Arnfinn Clementsen*

Vón er av stórum týdningi í lívinum hjá einum menniskja. Um vónin hvørvur, fjarar lívsneistin burtur. Vónin um ein betri morgindag hevur fingið menniskju at halda út gjøgnum tíðir við mótgangi. Vónin at gerast frískur, har sjúka er, vónin um frið, har kríggj herjar, vónin um hjálp, har fátækradømi er, vónin um sátt og semju, har stríð og ósemja valdar, vónin um eitt betri lív, har ting eru miseydnað. Sjálvt um ikki alt verður, sum fólk vónaðu, hevur vónin kortini verið har sum ein lívskraft í gerandisdegnum. Eg vil ráða tær til at halda fast í vónini, eisini tá ið tað sær myrkt út!

**Okkara Gud er vónarinnar Gud**. Paulus skrivar í Róm. 15,13: „Men vónarinnar Gud fylli tykkum við allari gleði og friði í trúnni, so at tit mega vera ríkir í vónini við kraft heilaga

andans.“ Vónin er ein partur av Guds natúr, og hann hevur givið vónina sum eina innara drívmegi og styrki í menniskjanum. Trúgv, vón og kærleiki hoyra saman, og tá ið hesi trý sleppa at virka saman, so verða heilsustøðan og javnvágin í lívi okkara góðar. Kærleikin er størstur, sigur Bíblian. Tað er vón í kærleikanum, og trúgvin virkar í kærleikanum. Vit vóna tað besta fyri tey, sum standa okkum nær, og sum vit elska, og tá ið øll vón er farin, so halda vit á at trúgva upp á framgongd og sigur. Í Róm. 4,18 lesa vit: „Sjálvt um tað tóktist vónleyst, trúði og vónaði Ábraham.“ *(N.S.)*

Mong eru ótrygg um framtíðina og við góðari grund. Nógv myrk skýggj eru á tíðarinnar sjónarringi. Veðurlag, fátækradømi, kríggj, flóttafólk, ósemjur. Fyri mong er eisini persónliga vónin minkað ella sløkt gjøgnum lívsins stríð. Eg trúgvi á Bíbliunnar orð um endatíðina og royndir, sum koma yvir verðina og mannaættina, men eg trúgvi eisini upp á øll orðini um vón og álit á framtíðina. Mitt í øllum hesum livir vónarinnar Gud, og vit eiga ein boðskap um framtíð og vón. So leingi vit liva á hesari klótu, skulu vit arbeiða fyri einari betri framtíð og sáa vón og trúgv og líta positivt frameftir.

Jesus kom fyri at bera frelsu, frælsi, gleði og vón inn í eina myrka og glataða verð, og Bíblian sigur: „Til navns hansara skulu heidningarnir (øll fólk) seta sína vón.“ Hvørja ferð vit boða evangeliið, sáa vit vón! Og tann kristna vónin er ikki bara fyri hetta lívið, men tað er ein vón, sum er fast grundfest í Jesu uppreisn frá teim deyðu. Tað merkir, at tað er ikki bara vón fyri hetta lívið, men eisini fyri tað komandi.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Vilt tú hava dupult, so mást tú biðja um tað, eins og Elisa bað frá Eliasi. 2. Kong. 2,9. – Job fekk dupult aftur av øllum, sum hann hevði átt, tá ið hann hevði biðið fyri vinum sínum. Job 42,10.

*e.c. ums.*

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 27. febr. | **Tekstur:** | Matt. 4,1-11 | **Bíbliuorð:** | Matt. 4,10b |
| 6. mars | **Tekstur:** | 1 Sám. 24,1-13 + 17-18 | **Bíbliuorð:** | 1 Pæt. 3,9 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 6** ***13. mars 2022*** **82. árg.**

# Hin óndi forðar okkum at biðja

Tá ið vit biðja, setir Gud sína kraft í gongd, tí hann hevur lovað okkum bønarsvar. Djevulin vil tí ikki, at vit skulu biðja, tí tað forðar honum at útinna sínar óndu ætlanir við okkum. Og um vit biðja, vil hann, at vit bara skulu biðja evarska lítlar bønir um pinkulítil ting, sum ikki hava stórvegis týdning í andaverðini.

Men vit mugu vera djørv og vísa stórt frímóð: „Latum okkum tí við frímóði ganga fram at hásæti náðinnar, fyri at vit kunnu fáa miskunn og finna náði til hjálpar í tímiligari tíð!“ Hebr. 4,16.

Hin óndi roynir at billa okkum inn, at okkurt er galið við bønum okkara: vit leggja ov lítla orku í bønina, bønir okkara eru ov stuttar at hava nakra ávirkan o.s.fr.

Hevur tú upplivað tað? Tá skalt tú vita, at næstan allar bønirnar, sum standa í Bíbliuni, eru stuttar og nágreiniligar. Tann stytsta bønin man helst vera bønin hjá Mósesi, tá ið hann bað Gud grøða systrina Miriam, sum var vorðin spitølsk. Her stendur: „Á, Gud, tú mást gera hana heila (fríska) aftur!“ 4. Mós. 12,13. Sjey dagar seinni var hon grødd fyri spitalskusjúku.

Gud kennir hjarta okkara. Hann sær, at vit meina hetta av sonnum. Tað er ikki neyðugt, at vit **føla**, at tað er so. Vit skulu bara vita tað og trúgva tí, tí Guds orð bindur ikki kenslurnar saman við bønarsvarinum. Tey eru einans bygd á Guds lyfti.

„Verið ikki stúrnir fyri nøkrum, men latið í øllum lutum tráan tykkara koma fram fyri Gud í ákallan og bøn við tøkk.“ Fil. 4,6.

*Effie Campbell* umsetti.

# Guds uppskrift upp á familjulívið

Mikael Leirgul var gestur á Kanal 10 og skuldi greiða frá, hvussu Gud hevði ætlað at familjulívið skuldi livast. Guds hjartalag sigur: felagsskapur, nærleiki og samljóð. Djevulin hevur aðra skrá. Hann skilur mann og konu, børn og foreldur. Børn verða koyrd á stovn pinkalítil.

1. Kor. 13 kallast Kærleikskapitlið. Har stendur í v. 5: „Kærleikin søkir ikki sítt egna." Nei, hann er punktið, sum alt hjólið melur um. Hann tænir øðrum. Soleiðis skal tað vera millum mann, konu, børn og víðari út í familjuna. Hjúnalagið skal ikki vera ein samráðingarpallur, har eg komi við mínum, og konan við sínum. Nei, eg leggi lív mítt niður fyri hana og taki tað ongantíð aftur, og hon ger tað sama fyri meg.

Í heiminum ræður Guds kærleiki, og Guds friður kemur inn. Hann kunnu vit ikki sjálv skapa. Vit kunnu syrgja fyri, at eingir samanbrestir eru. Men Guds friður er ítøkiligur, tað merkir tú, tá ið tú kemur inn í eitt heim. Tú kanst koma inn í eitt heim, og tú merkir týðiliga, at her hava verið søgd hørð orð. Jesus segði, at tá ið tú kemur inn í eitt heim, skalt tú lýsa Guds signing yvir tað, men um tað ikki er tað vert, so skal friðurin venda aftur til tín. Friðurin vinnur pláss, tá ið vit ikki stríðast um leiklutirnar hvør hjá øðrum, men góðkenna teir.

Maðurin er høvdið á kroppinum, men hann skal ikki vera ráðaríkur og ein høvuðkambur, tí tað leiðir til uppreistur. Bæði uppreistur og hetta at „herska" og vera so ráðaríkur er ikki rætt. „Soleiðis bera vit okkum ikki at í mínum ríki," sigur Jesus. „Vit bera okkum ikki at, sum verðin ger."

Høvdið skal vera ein vernd móti óveðri, ein stuðul, ein paraply. Eg skal standa í skarðinum og verja mína konu og míni børn í bøn. Øll álop skulu steðga hjá mær. Eg verji tey við mínum bønum. Tá tey liva í uppreistri, draga tey seg burtur frá paraplyini og missa verndina. Tá tey eru vaksin, verjir Gud tey. Men alt tað, sum Gud gav okkara fyrstu foreldrum, góvu tey fíggindanum og gjørdu sostatt ta grovastu svikagerð. Tá kom Gud og segði: „Hetta skal eg taka mær av." So kom Jesus og rindaði fyri allar heimsins syndir.

Kristus er høvdið í meinigheitini. Maðurin er høvdið í familjuni. Kona mín skal fáa loyvi at hvíla og kenna seg trygga. Hon skal fáa loyvi at vera mamma og kona. Friðurin flytur inn,

og tað skulu børnini fáa loyvi at vaksa upp í. Sum pápi tekni eg hvønn dag eina mynd av Gudi djúpt inni í sálini á børnunum. Tí Gud sigur, at hann er pápi okkara, og so hugsa tey: „Hvørjar upplivingar havi eg av pápa?“ Tá er tað mín máti at vera pápi, sum teknar myndina av Gudi fyri teimum. Hetta er ein stór ábyrgd. Tá kann eg ikki liva sum ein ráðaríkur tyrannur í heiminum. Eg má eyðmýkja meg og biðja míni børn um fyrigeving, tá ið eg havi gjørt okkurt galið mótvegis teimum.

Henda myndin verður flutt yvir á meinigheitina. Jesus er høvdið. Limirnir eru likamið. Um teir siga, at teir hava ikki brúk fyri høvdinum, so gongur ein høvuðleysur kroppur inni í meinigheitini. Tá stendur illa til hjá tí samkomuni.

*Effie Campbell.*

# Sterkasta megin í alheiminum

Gud er hin sami um aldur og allar ævir. Tá ið Ísraels fólk skuldi fara út úr Egyptalandi, sendi Harrin fyrst 9 plágur; men tær fingu ikki hin ónda Fárao í knæ. Tá fekk Móses tey boðini, at fólkið skuldi slakta hvør sítt lamb og smyrja blóðið á durastólparnar. Tá ið deyðseingilin fór herjandi um landið, sótu tey, sum høvdu smurt blóðið á durastólparnar, trygg og væl vard inni, og síðani kundu tey fara gjøgnum oyðimørkina og til lovaða landið.

Sterkasta megin í universinum, í alheiminum, er blóðið, og kraftin virkaði ikki bara tá; men hon virkar um aldur og allar ævir. Tað slaktaða lambið er ein fyrimynd upp á okkara páskalamb, Jesus Kristus.

Eins og blóðið vardi tey tá, á sama hátt verjir tað eisini í dag. Tá ið tú fert til songar, bið so Jesus fjala teg, tíni og alt húsið, sum tað er, undir hansara dýrabara blóði. Tá hevur tú „smurt blóðið á durastólparnar“.

Ein trúgvandi maður í Danmark fór av forvitni inn í eina scientology-kirkju. Hann setti seg aftast. Hann fekk tað ómetaliga ringt og gjørdist illa til passar at vera inni har. Hann settist at biðja innantanna: „Harri, fjal meg undir blóði tínum!“ Hesa bøn bað hann alla tíðina. Talarin fór upp á talarastólin og segði: „Vit høvdu ætlað, at okkurt stórt skuldi fara fram her í dag. Men vit fáa einki gjørt, tí onkur kristin er inni her.“ Jú sanniliga, Jesu blóð verjir móti øllum óndum.

*Effie Campbell.*

# Bíbilskir profetiir

*Emanuel Minos*

Eg sat ein dagin og hugsaði um nøkur løgin profetiir í Bíbliuni, sum eru uppfylt, og skal eg nevna nøkur teirra her.

4.000 ár, áðrenn tað hendi, greiddi Móses frá gasskømrunum, har 6 mill. jødar vórðu gassaðir til deyðis í týsku deyðs-legunum. Tað stendur í 5. Mós. 32,25, og her endurgeva vit úr norsku Bíbliuni, tí hon sigur tað skilligari: „...inne i kamrene skal redsel bortrive både unge menn og jomfruer, det diende barn og den gråhårede mann.“ Ja sanniliga, tey vórðu rikin inn í kømrini, gasskømrini, har gassið gjørdi av við tey. Í vers 24 stendur: „De skal utsuges av sult og fortæres av brennende feber og giftig sott.“ Hvør hevur ikki sæð myndirnar av hesum hungurstungnu menniskjunum, tey vóru sum livandi lík. Tann giftiga sóttin, sum stendur umrødd her, er gassið. Hugsa tær til, hetta varð profeterað 4.000 ár, áðrenn tað hendi.

Fyri 3.500 árum síðani profeterar Jóel í 3,7, at fólk fara at skifta Ísrael sundur í tvey: „...tá savni eg allar tjóðir og føri tær oman í Jósafats dal; har skal eg døma tær vegna fólk mítt, Ísrael, arvalut mín, ið teir spjaddu út millum heidningarnar, og **skiftu land mítt sundur**.“ Jerusalem, høvuðsstað Ísraels, býttu teir eisini sundur. Zakarja profeterar í 12,3: „Á tí degi geri eg Jerusalem at havi (ein tungur steinur) fyri allar tjóðir; hvør, ið roynir at lyfta tí, skal meiðsla seg til blóðs.“ Harrin ávarar og sigur, at í endatíðini skal revsingin raka tey, sum býttu landið sundur.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Tann treiski skal búgva í einum turrum landi. *e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 13. mars | **Tekstur:** | 2 Sám. 11,2-5 + 14-17 + 26-27; 12,1-7a + 9-13 | **Bíbliuorð:** | 1 Jóh. 1,9 |
| 20. mars | **Tekstur:** | Matt. 21,12-16 | **Bíbliuorð:** | Matt. 21,13b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74